| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 29.06.2017 |
| Býráðsfundur nr. | 8/2017 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Marin Sólheim Thomsen |
| | |

Ár 2017 tann 29.06.2017, kl. 19.00 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 23.06.2017 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sonni á Horni
Eivin Breiðaskarð
Kristian Petersen
Ólavur Larsen
Árant Berjastein
Magni Herason Jøkladal
Sigurð S. Simonsen
Eyðun á Lakjuni
Edva Jacobsen
**Skrivari:** Marin Sólheim Thomsen

## Mál nr. 25/2017.

**Stroyming av almennum býráðsfundum**
Sonni á Horni hevur skotið upp, at farið verður undir at stroyma almennar býráðsfundir og at útgerð verður fingin til vega til endamálið.
Niðanfyri er eitt tilboð , har møguleiki er fyri, at teir koma á staðið við útgerð og mannning til hvønn fundin sær og orðna alt fyri býráðið, fyri eina fasta uphædd hvørja fer. Eisini er møguleiki fyri at keypa útgerð, men er ongin endaligur kostnaður nevndur fyri tað.
Málið hevur verið fyri á fíggjarnevndarfundi tann 22.06.2017 og mælir nevndin býráðnum til at taka av tilboðnum, har fyritøkan kemur á staðið til hvønn fundin sær og tekur sær av øllum, til ein fastan kostna.

**Avgerð til mál nr. 25/2017:**
Tilmælið frá fíggjarnevndini varð samtykt (9-0).

## Mál nr. 26/2017.

**Mál viðv. Skipa-vøru- og leigugjaldsskrá fyri Fuglafjarðar havn.**

**Vinnunevndin hevur á fundi 20. Juni 2017 viðgjørt mál um Skipa- vøru- og leigugjøld fyri Fuglafjarðar havn.**

Meirilutin Kristian Petersen og Magni Jøkladal mæla býráðnum til at samtykkja fyriliggjandi, dagførdu og broyttu vinnuskrá.
Meðan minnilutin Sigurð S. Simonsen mælir til at gera hesar tillagingar til gjaldskránna: At vørugjaldið á alifiskafóðri verður sett til 18 kr. tonsi og at ráfiskagjaldið verður sett til 0,5% av veiðuvirðinum, galdandi frá 1. juli 2017.

-----------------------------------------------------------------------------------------------

**Frá Vinnunevndarfundi 20.juni 2017**
Til viðgerðar var seinasta og endalig viðgerð av arbeiði viðv. nýggjari Skipa-, vøru- og leigugjøld fyri Fuglafjarðar havn.
Meirilutin mælir til at gjaldskráin verður broytt og dagførd samb. fyriliggjandi uppskot, har stórsta prinsippiella broytingin er, at farið verður frá rávørugjaldi í procent av virðinum til fast gjald pr. tons.
Eisini eru broytingar gjørdar í flestu gjøldum, sum eru relevant fyri Fuglafjarðar havn.

**Avgerð til mál nr. 26/2017:**
Málið hevur verið fyri á býráðsfundi tann 29.06.2017. Fyrst varð atkvøtt fyri uppskotinum frá Sigurð S. Simonsen. 3 atkvøddu fyri málinum og 6 atkvøddu ímóti. Ímóti atkvøddu Eivind Breiðaskarð, Kristian Petersen, Árant Berjastein, Magni H. Jøkladal, Ólavur Larsen og Sonni á Horni. Síðan var atkvøtt fyri meirilutauppskotinum. 6. atkvøddu fyri og 3 atkvøddu ímóti. Ímóti atkvøddu Sigurð S. Simonsen, Eyðun á Lakjuni og Edva Jacobsen. Sostatt varð tilmælið frá meirilutanum í Vinnunevndini, samtykt (6-3)

## Mál nr. 27/2017.

Mál viðv. skúlasamstarvi við Eysturkommunu.

**29. juni 2017 kl. 16.00** varð var fundur hildin í mentamálanevndini á kommunuskrivstovuni har "Sáttmáli um skúlasamstarv millum Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu" varð viðgjørdur.
Mentamálanevndin mælir einmælt býráðnum til at taka undir við sáttmálanum um skúlasamstarv millum Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu. Mentamálanevndin skjýtur upp, at Árant Berjastein verður kommunu-stýrisumboð í skúlastýrinum og at Kristian Petersen verður varalimur.

**Málið hevur verið fyri á býráðsfundi 29.06.2017.Tilmælið frá mentamálanevndini um at taka undir við sáttmálanum um skúlasamstarv millum Fuglafjarðar kommunu og Eysturkommunu, við uppskoti um skúlastýrislim og varlim, varð einmælt samtykt. (9-0)**

## Mál nr. 28/2017.

Mál viðv. bygging og útbygging av ítróttarhúsinum.

**Mentamálanevndini hevur á fundi 20. juni samtykt at leggja málið um ný- og útbygging av ítróttarhúsinum, har 1 mió kr. eru avsettar á fíggjarætlanini fyri 2017 til endamálið, fyri býráðið til viðgerðar tann 29.06.2017.**

Mentamálanevndin leggur málið um ítróttarhús fram, og vísur á, at ein mió kr er sett av í verandi fíggjarári. Nevndin hevur umrøtt málið við ein veitara, sum hevur gjørt eina meting av og rágivið um, hvussu farast kann til verka og hvat eftir teirra meting eigur at raðfestast í verandi fíggjarári.

Nevndin mælir til at leggja málið fyri býráðið.

Nevndin metir, at um málið verður samtykt av býráðnum, verður tørvur á eini eykajáttan, fyri á náa ásettu arbeiðum í 2017.

Mentamálalimur eru samdur í at ítróttarhúsið eigur at raðfestast saman við skúlabygging og íbúðarbygging og vísir á, at lántøkan til raðfestu íløgur, eigur at skipast í ein leist, sum bøtir um rásarúmið hjá verðandi býráðið.

Mentamálanevndin er samd um, at tá farið verður í holt við ítróttarhús, skal íløgan gerast yvir eitt styttri áramál. Tvs um býráðið samtykkir at byrja arbeiði í 2017, skal húsið gerast liðugt í 2018. (byggjast í síni heild, men niðasta hædd gerast brúkbar).

Nevndin mælir tí býráðnum til at viðgera málið á býráðsfundi 29.06.2017.

**Avgerð til mál nr. 28/2017:**

Málið hevur verið fyri á býráðsfundi tann 29.06.2017. Tilmælið frá Mentamálanevndini um at fara í holt við arbeiðið beinanvegin, varð einmælt samtykt. (9-0)

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 22,00

Eivin Breiðaskarð

Kristian Petersen

Árant Berjastein

Magni Herason Jøkladal

Ólavur Larsen

Eyðun á Lakjuni

Sigurð S. Simonsen

Edva Jacobsen

Sonni á Horni

Skrivari: Marin Sólheim Thomsen